# Kloakk verður løgd undir Svartafoss



Í næstum verður farið undir at leggja kloakk undir Svartafoss. Hetta er grundað av at kloakkvatn skal úr Hoydalsá. Niðasti partur av verkætlanini er gjørdur, og nú skal altso ovara Økið í Hoydølum gerast. Talan er um økið, sum er oman frá Svartafossi. Tað er Frank Hellisdal, ið hevur fingið arbeiðið. Arbeiðið verður mett at kosta smáar tvær milliónir krónur.




Dugir tú at greina búskap og at gera hann einfaldan fyri fólki?

## BÚSKAPAR- OG SAMSKIFTISFÓLK

Í Landsbanka Føroya ynskja vit støðugt at kunna almenningin um tey týðandi úrslit, greiningar og niðurstøður, stovnurin kemur fram til. Hesa kunning og samskiftið við borgarar og landsmyndugleikar ynskja vit støðugt at styrkja og menna. Tað verður tín uppgáva at standa fyri hesum í tøttum samstarvi við hini starvsfólkini í Landsbankanum.

Tú skalt tí hava sera góð samskiftisevnir. Men samstundis skalt tú eisini gera greiningar av búskapi, og tí er ein búskaparlig útbúgving ella gott skil fyri búskapi ein fortreyt. Tú skalt duga at gera trupul evni greið og einføld, soleiðis at okkara úrslit verða skillig fyri almenninginum. Tú skalt duga væl at gera kanningar og seta teg inn í torgreiddar spurningar.

Ein týðandi partur av tínum arbeiði verður tí at skriva frágreiðingar, tíðindaskriv og kunning á okkara heimasíðu. Men eisini í samstarvi við hini starvsfólkini at gera tær kanningar og greiningar, sum eru grundarlagið undir hesum.

Vit hugsa okkum, at tú hevur ein búskaparliga útbúgving umframt royndir/útbúgving innan samskifti. Men tú kanst eisini søkja, um tú hevur eina samskiftisútbúgving og góðan kunnleika til búskap.

Landsbankin er ein ágrýtin og hollur stovnur við dugnaligum starvsfólki. Arbeiðið er fjølbroytt og vit eru einans 11 starvsfólk. Vit arbeiða tískil tætt saman um okkara týðandi uppgávur.

**Førleikakrøv**
Sum samskiftisfólk í Landsbanka Føroya skalt tú hava hesar førleikar:

- Góðan kunnleika til búskap
- Góð analytisk evni
- Hollar royndir og evnir at samskifta
- Dugira væl at skriva
- Málsliga væl fyri

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi starv í einum fakliga sterkum umhvørvi. Møguleikarnir fyri eftirútbúgving eru góðir. Løn sambært sáttmála.

**Meira at vita**
Tú ert vælkomin at venda tær til Sigurd Poulsen á telefon 308120 ella senda eitt teldubræv til sigurd@landsbankin.fo. Eisini ber til at vitja heimasíðu okkara www.landsbankin.fo, har eitt nú bygnaðurin og uppgávurnar hjá Landsbanka Føroya eru neyvari lýstar.

**Umsóknarfreist**
Send okkum tína umsókn við avriti av viðkomandi skjølum og prógvum. Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 30.07.2007

Landsbanki Føroya
Staravegur 5
Postsmoga 229
FO-110 Tórshavn

Landsbanki Føroya er stjórnarbanki landsins, ið hevur til endamáls at virka sum bankasamband hjá landsstýrinum, umframt at virka fyri tryggum fíggjarviðurskiftum og støðugari búskapargongd í Føroyum.

Sansir.fo

Landsbanki Føroya
GOVERNMENTAL BANK

Landsbanki Føroya | Staravegur 5 | P.O.Box 229 | FO-110 Tórshavn | Faroe Islands | www.landsbankin.fo | landsbankin@landsbankin.fo


# ALV fer undir framleiðslu á Kambsdali

Gongst eftir ætlan hevur ALV eitt framleiðsluvirkið á Kambsdali um eitt ár.
- Við hesi ætlan skapa vit eini 25 arbeiðspláss fyri fólki úr Norðoyggjum, Eysturoy og nakað av Streymoy, upplýsir fyristøðukvinnan, Kristina Larsen.
Høvðusvirksemið á virkinum verður ein endurnýtsluhøll, sum fer at umvæla gamlar møblar og lutir, sum skulu seljast. Eftir ætlan fer virkið eisini at framleiða ymiskar lutir ella partar av framleiðslum fyri føroysk virkir.
Framleiðsluvirkið verður eitt arbeiðspláss fyri fólk, ið hava fingið tillutað hálva ella fulla pensjón. Ein partur, sum vanliga ikki er so sjónligur á føroyska arbeiðsmarknaðinum, men sum gjøgnum mennandi tilboð kann geva sína arbeiðsmegi til føroyska arbeiðsmarknaðin og hervið eisini verða við til at geva vinnulívinum í Føroyum størri og fjølbroyttar arbeiðsmegi. Bygningurin talan er um er "Kommunufjósið", sum Fuglafjarðar Kommuna eigur á Kambsdali.  ALV fer í næstum at gera bygningin kláran og miðað verður móti at byrja nýggja framleiðsluvirki um eitt ár.

# 47 grundstykki klár í Klaksvík

Skjótt verða 47 grundstykki í Klaksvík bjóðað út. Tað er felagið Kanjon, ið letur húsini byggja. Húsabyggingin fer væntandi í gongd um ársskiftið. Grundstykkini eru millum Hjalla, har sera gott útsýni er yvir býin. Sambært Klaksvíkar Kommunu eru brøvini um grundstykkini longu send umsøkjarunum.

# Fødd 07.07.07 kl.07

Á Good Hope Hospital í Birmingham varð lítla Elizabeth Elie fødd 07.07.07 kl.07. Ikki nokk við tí, Elizabeth var eisini sjeynda barnið hjá foreldrunum. – Her eru sjey-tøl yvir tað heila. Hetta má vera eitt tekin, ein gáva frá Gudi, heldur mamman, Serge Elie. Dagurin 7. juli 2007 hevur m.a. verið nýttur til serstakliga nógv brúdleyp, eisini í Føroyum. Talið 7 verður víða um roknað sum eitt eydnutal.